**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 18 | 6 | 12 | 21 |
| 2 B36 | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 16 | 6 | 10 | 19 |
| 3 NSÍ | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 14 | 9 | 5 | 15 |
| 4 HB | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 18 | 13 | 5 | 14 |
| 5 Skála | 8 | 4 | - | 0 | - | 4 | 10 | 13 | -3 | 12 |
| 6 KÍ | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 15 | 11 | 4 | 10 |
| 7 B71 | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 12 | 13 | -1 | 8 |
| 8 GÍ | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 10 | 17 | -7 | 8 |
| 9 AB | 8 | 1 | - | 2 | - | 5 | 11 | 19 | -8 | 5 |
| 10 VB/S | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 6 | 23 | -17 | 3 |

**1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B68 | 8 | 7 | - | 1 | - | 0 | 26 | 6 | 20 | 22 |
| 2 FSV04 | 8 | 6 | - | 1 | - | 1 | 16 | 6 | 10 | 19 |
| 3 ÍF | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 24 | 7 | 17 | 17 |
| 4 LÍF | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 23 | 11 | 12 | 13 |
| 5 TB | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 12 | 6 | 6 | 10 |
| 6 HB | 8 | 3 | - | 1 | - | 4 | 12 | 20 | -8 | 10 |
| 7 NSÍ | 8 | 3 | - | 0 | - | 5 | 14 | 18 | -4 | 9 |
| 8 SÍ | 8 | 2 | - | 1 | - | 5 | 9 | 17 | -8 | 7 |
| 9 KÍ | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 9 | 23 | -14 | 6 |
| 10 B36 | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 3 | 34 | -31 | 3 |

# i sterkum sandoyingum




*– Nú vil eg ikki ljóða hástórur, men eg haldi vit royna at vinna hvønn dyst, vit spæla, sigur Eli Hentze hjá B71*

Tað var móti NSÍ, men vikuskiftið aftaná stóðu teir fyri higartil mest óvæntaða úrslitunum í ár, tá teir rætt og slætt eyðmýktu meistararnar HB í Gundadali og vunnu við trimum málum móti ongum. Vikuna aftaná fingu teir javnt móti KÍ, 22. apríl vunnu teir á AB, og eina viku seinni spældu teir javnt ímóti GÍ. Síðani hevur liðið tapt tveir dystir á rað og er yvirhálað av Skála, men hevur tó framvegis GÍ, AB og VB/Sumba aftan fyri seg. Eitt sindur óvæntað, at teir liggja so frægt fyri sum teir gera.

– Lagið er gott í Sandoy. Ikki ein kjaftur gav okkum nakran sum helst møguleika, tá árið byrjaði, men nú eru átta dystir farnir og hygg hvar vit liggja, sigur Eli Hentze, sum eisini vísir á orsøkirnar til góðu úrslitini.

– Frá 2001 og fram til í fjør, legði felagið seg eftir at geva okkara egna fólki loyvi at menna seg. Stillisliga hava ungu menninir fingið fleiri og fleiri minuttir, og teir bera felagið í dag, sigur Eli Hentze og reksar nøvn sum Símun Rógvi Hansen, Magnus Olsen og Rógvi Nielsen upp saman við fleiri øðrum.

### Fegnast um Ble

Eli Hentze sigur, at B71 fer eftir sigrinum móti VB/Sumba, men heldur ikki at tað ger teirra uppgávu lættari, nú VB/Sumba vantar tríggjar leikarar.

– Nú havi eg spælt fótbólt so leingi, og persónliga vil eg siga, at mær dámar fult so væl møta fullmannaðum liðum. Vit mugu altíð fyrireika okkum uppá at møta fullmannaðum liðum, tí annars kann tað kiksa. So persónliga hugsi eg ikki um hvør manglar, hvussu veðrið og hvør dømur, sigur Eli Hentze, sum bara fegnast um, at Evrard Ble er við aftur hjá VB/Sumba.

– Jamen, tað gleðir meg, tí hann er ein frálíkur bóltspælari, sigur Eli Hentze.

## Við – ikki við

Allir mans tøkir

*Leikbann:* Birgir Jørgensen, Birni Kjærbæk og Martin Tausen
*Við aftur:* Evrard Ble

*Við aftur:* Anders Rasmussen

*Skaddur:* Ólavur S. í Ólavsstovu
*Ivasamur:* Jákup á Borg hevur trupulleikar við lærinum
*Við aftur:* Tróndur Vatnhamar og Christian Høgni Jacobsen

*Skaddur:* Arnbjørn Hansen, Knút V. Vesturtún og Sorin Angel
*Ivasamur:* John Heri Dam og Esmar Eiðisgarð
*Burturstaddur:* Teitur Joensen

## breyt hagtølini

| | '06 | 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B36-Skála | 2-2 | - | 2-2 | - | 2-0 | 2-1 | 6-0 | - | - | - | - | - | 3-2-0 | 14-5 |
| KÍ-GÍ | 1-4 | 1-1 | 1-2 | - | 1-1 | 1-0 | 5-1 | 1-2 | 2-1 | 0-0 | 4-2 | 4-5 | 4-3-4 | 21-19 |
| NSÍ-AB | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| VB/S-B71 | - | - | - | - | - | - | - | 6-1 | 0-1 | 1-1 | - | 2-0 | 2-1-1 | 9-3 |
| HB-EB/S | 2-2 | 2-3 | 3-0 | 4-0 | 3-0 | 5-0 | 2-0 | 1-0 | - | - | - | - | 6-1-1 | 22-5 |